# Stórt tiltak í høllini í Runavík

TÍÐINDASKRIV
*Kunningarstovan í Saltangará*

### Stórt tiltak í høllini í Runavík

Komandi dagarnar skipar Kappróðrarfelagið NSÍ fyri stórum tiltaki í ítróttarhøllini í Runavík. Tiltakið byrjar hóskvøldið 16. oktober og endar sunnukvøldið 19. oktober.

### Hoppuland

Hóskvøldið kl. 19:00 letur eitt sokallað hoppuland upp í ítróttarhøllini í Runavík. Har eru í alt 7 ymisk "hopputing", sum øll vitjandi, bæði ung og gomul, fáa høvi at royna. Møguleiki verður at keypa bilettir fyri hvørt einstakt ting ella eitt arband, sum er galdandi fyri allan dagin. Opið verður hóskvøldið frá kl. 19:00-22:00, fríggjadagin frá kl. 16:00-22:00, leygardagin frá kl. 10:00-14:00 og frá kl. 19:00-22:00 og sunnudagin frá kl. 15:00-22:00.

Candyfloss, poppcorn og sodavatn verður til keyps allar dagarnar.

### Seyðasøla

Leygardagin kl. 14:00 verður seyðauppboð. Seldir verða umleið 15 seyðir, harav 2 veðrar. Afturat hesum verður ein stórur veðrur seldur á mexicanskan hátt, har boðið verður 50 kr. hvørja ferð. Høvi verður at keypa sær ein kaffi ella temunn og smurt breyð. Eisini verður stórt lekkurt mat- og køkutombola, fiskibrunnur og søla av døgurðamati úr sjónum.

VIÐMERKINGAR

# Í brigdisleysum haga – onnur viðmerkingin hjá Hanusi KAMBAN

Kjartan Hoydal



**Hanus leggur sera stóran dent á at ein gongd móti loysing eigur at hava stuðul frá einum størri parti av tinginum og at meira átti at verið gjørt við at fingið Javnaðarflokkin við. Hesin hevði kanska, móti at fáa aðrar sømdir, kunnað fingist við til stig D í gongdini, heldur Hanus. Eg skilji Stig D, sum íslendsku loysnina, Konungsríkið Ísland og Kongeriget Danmark, sum skipanin var millum Ísland og Danmark frá 1918 til 1944, við fullum fullveldi hjá altinginum og fólkatinginum, júst tann loysnin Føroya Landsstýri skeyt upp og samráddist við donsku stjórnina um í 2000, men sum danska stjórnin ikki vildi hoyra um. Hetta er áhugavert og tað hevur stóran áhuga at fáa at vita um leiðslan í javnaðarflokkinum er samd við Hanus í hesum. Tað hevði kanska verið eitt hugskot at sent ein drunn til formannin í Javnaðarflokkinum við hesum spurningi.**

Í grein í Sosialinum 4. okt. 2003 ber Hanus Kamban meira tilfar til eitt orðaskifti um politisku gongdina her á landi síðani 1998 og takk skal hann hava fyri tað. Partar av greinini geva eina klárari mynd av hvussu Hanus metir gongdina, nú vit kunnu sleppa ummælinum av filminum hjá Ullu Boye Rasmussen.

Viðvíkjandi krøvunum til filmin haldi eg tað vera eitt sindur góðvarið at vænta at filmurin skuldi vera eitt slag av politisk-søguligari, javntvigandi reportasju, sum tað vit síggja í vanligum tíðindasendingum ella søguligum sendingum. Við at geva einum dokumentaristi sum Ullu Boye Rasmussen uppgávuna var ikki annað væntandi enn at filmurin varð søgan sæð gjøgnum eyguni hjá leikstjóranum, soleiðis sum hon fataði søguna. Vit kravdu heldur ikki at Ulla Boye Rasmussen í filminum um Gásadal gav eina fulla mynd av bygdarmenningarpolitikkinum í Føroyum. Ein orðing hjá Hanusi er rættiliga óndsinnað: "Tað prinsipiella í hesum máli er munurin millum politiskan vilja og søguliga ella søgufrøðiliga lýsing. Politikarar vilja nakað, virka fyri tí og tvinga mangan onnur økir, eitt nú søgu ella bókmentir og list, inn undir henda vilja. Vit kenna hetta rákið frá miðøldini og frá nútíðar einaræðum. Søgan verður, undir ávirkan ella trýsti frá valdinum, til mýtologi ella hagiografi. ". Hetta reisir spurningin: Hvør politiskur vilji hevur trýst Ullu Boye Rasmussen? Danskir stovnar sum hava goldið filmin? Neyvan man føroyska landsstýrið havt møguleikar at gera tað.

Mær dámar ikki heldur nýansurnar hjá Hanusi tá hann skákvegis roynir at bera fram ta mynd, at hin grundleggjandi demokratiska verkætlaninat fáa fullveldið aftur til Føroya Løgting, er av sama slag sum politiskar rørslur í øðrum londum í aðrari tíð og við heilt aðrari dagsskrá. Hann sigur: " Mong í hesum liðið (vit gita serliga loysingarhugað kjh) tykjast hava somu viljaheimsspeki sum t.d. Lenin hevði, tað sum eg vil verður. "Hesin mátin at lita myndina av fullveldisveinginum hevur verið nýttur av øðrum, fólkafloksmonnum, sambandsmonnum og javnaðarmonnum og -konum; ikki við at sipa til Lenin, men til Hitler, nasismu og terrorismu. Tað skrivingar- og tosingarlagið stuðlar ikki upp undir eitt bøtt politiskt orðaskifti.

Ein týðandi partur av seinnu viðmerkingini hja Hanusi er ein persónlig lýsing av heimastýrislógini og ríkisfelagsskapinum, væl lýst, men ein fatan sum eg eri púra ósamdur í.

Heimastýrislógin var eitt stig rætta vegin, aftan á føroyska fólki við fólkaatkvøðuni 14. september 1946 hevði sagt nei til teir kostir, sum danska stjórnin - og summir føroyskir flokkar - høvdu borðreitt við. Hanus sær hana í sera jaligum ljósi, sum grundarlagið undir tí framburði, sum hevur verið í Føroyum síðani 1948.

Mín fatan er, at heimastýrislógin skapti eitt ábyrgdartómrúm. Frá einari skipan, har Færø Amt var ein partur av donsku skipanini við vælskipaðum umsitingarligum viðurskiftum, politiska ábyrgdin á greiðum stað hjá donskum ráðharrum og eingi ivamál um býti av ábyrgd millum útinnandi, lóggevandi og dømandi valdið. Í staðin kom heimastýrislógin, sum leggur nøkur mál til føroyskt útinnandi vald og lóggávuval, men ikki onnur og varðveitir dømandi valdið á donskum hondum. Hetta vald varð flutt til eina skipan, sum ikki hevði aðrar royndir enn at vera eitt í flestu førum ráðgevandi amtsráð. Vit fingu eitt blandingsstýri, sum forjónaði politiska ábyrgd. Tað var púra ógreitt hvør tók sær av hvørjum.

46 ár fingu áðrenn hesi viðurskifti so dánt vóru rættað viðvíkjandi útinnandi og lóggevandi ábyrgd, rættarskipanin er enn ikki er fingin í rættlag. Hetta fløkta ábyrgdarbýtið var í nútímans máli "high risk", váðin at skipanin kollsigldi var stórur og tað gjørdi hon eisini í 1951/52 og aftur í 1992.

Hvussu lítið umhugsað alt var sæst aftur í tí sera ófullfíggjaða lógarverkinum vit dagin í dag hava fyri tey lógarøki, sum kanska hava mest við rættartrygdina hjá tí einstaka borgaranum at gera. Danska skipanin sá tað ikki sum sína uppgávu at dagføra lógir innan vernd av sinnisveikum, fosturtøku, familjurætti, viðurskiftum á arbeiðsmarknaðinum fyri bert at nevna tað sum hevur verið frammi í seinastum í fjølmiðlunum. Føroysku myndugleikarnir høvdu neyvan arbeiðsorku at fylgja við og hetta vóru jú oftast mál, sum danskir ráðharrar høvdu politiska ábyrgd av.

Hin fylgjan var, at føroyskir politikarar meira og meira valdu at dúva upp á ríkisveitingar úr Danmark. Vit kunnu rokna danska stuðulin út, sum % av bruttotjóðarúrtøkuni. Í 1950 var danski parturin væl undir 10 %, beint undan kreppuni var hann komin upp móti 20 %.

Orsøkin til hetta var, at føroyskir politikarar ikki høvdu álit á, at føroyski búskapurin kundi fíggja føroyska vælferð. Eitt gott dømi var sera neyðuga nútímansgerðin av sosiallógunum, sum vórðu framdar av landstýrinum undir P.M.Dam 1959-1963. Sjálvandi var tørvur á dagføring av sosiallógunum í Føroyum - eingin flokkur gekk móti tí - men at fíggja tær við ríkisveitingum var í roynd og veru eitt misálit á evnini í føroyska samfelagnum at skapa grundalagið fyri vælferðini sjálvt og var við tíðini ein koddi. Sum ikki einaferð í heimastýrisskeiðinum, góð politisk endamál, men skeivur framferðarháttur.

Hanus hevur hesa greiða á áhugaverda uppstilling um hvussu hann sær stigini í einari gongd fram móti einari møguligari loysing og hetta er tann parturin, sum letur upp fyri framhaldandi dialogi.

A. Amtsstøða Løgtingið ráðgevandi. Lóggávuvald og útinnandi vald í Danmark.
B. Heimastýri Løgtingið lóggevandi. Avmarkað lóggávuvald og útinnandi vald flutt til Føroya.
C. Heimastýri eftir Økt lóggávuvald og útinnandi vald. sjálvstýrislóg Búskaparligt sjálvbjargni. felags grundlóg.
D. Samveldi Samstarv millum javnstødd ríkir, hvørt við síni grundlóg. Lóggávuvald, útinn-andi vald og dómsvald á føroyskum hondum.
E. Loysing Samstarv millum sjálvstøðug ríkir.

Hanus leggur sera stóran dent á at ein gongd móti loysing eigur at hava stuðul frá einum størri parti av tinginum og at meira átti at verið gjørt við at fingið Javnaðarflokkin við. Hesin hevði kanska, móti at fáa aðrar sømdir, kunnað fingist við til stig D í gongdini, heldur Hanus. Eg skilji Stig D, sum íslendsku loysnina, Konungsríkið Ísland og Kongeriget Danmark, sum skipanin var millum Ísland og Danmark frá 1918 til 1944, við fullum fullveldi hjá altinginum og fólkatinginum, júst tann loysnin Føroya Landsstýri skeyt upp og samráddist við donsku stjórnina um í 2000, men sum danska stjórnin ikki vildi hoyra um. Hetta er áhugavert og tað hevur stóran áhuga at fáa at vita um leiðslan í javnaðarflokkinum er samd við Hanus í hesum. Tað hevði kanska verið eitt hugskot at sent ein drunn til formannin í Javnaðarflokkinum við hesum spurningi.

Hanus ger nógv burtur úr fólkaviljanum. Tað er ringt at tulka fólkaviljan, bert valúrslit kunnu nýtast til tað. Kanska meira áhugavert er, at tú fært varhugan av at fólkaviljin hjá Hanusi er eitt heldur statiskt fyribrigdi, sum ikki má nervast av tí, sum Hanus gevur heitið viljahugsan.

Eg havi ringt við at skilja hvussu politikkur skal rekast um teir flokkar sum bjóða seg fram ikki seta klár politisk mál. Tey kunnu kanska vera rættuliga fjar, men veljarin eigur at hava eina greiða mynd av hvar flokkarnir ætla sær og um teir ætla at broyta karmarnar í føroyska samfelagnum, t.d. viðurskiftini við Danmark. Hetta kann so við tíðini broyta fólkaviljan, tað eru nógv dømi um tað. Mín meting er, at hóast tann ætlan, íslendska loysnin, sum landsstýrið hevði í fyrsta umfari í samráðingum við donsku stjórnina ikki førdi á mál, so setti hon nakað í gongd, sum so ella so flytur føroyska samfelagið móti størri ábyrgd, við øðrum orðum flytur fólkaviljan móti fullveldi.

Har má vera ein neyðug hugsjónarlig optimisma í øllum politikki, sum vil broyta nakað.

Um andstøðuflokkarnir skulu takast fyri fult mugu teir líka so greitt sum fullveldisrørslan vísa á hvat teir vilja, hvørjar hugsjónir teir hava at seta upp ímóti. Teir mugu greiða frá um teir vilja hava studningsbúskap ella sjálvberandi búskap. Um teir vilja siga frá sær tey amboð til at fóta sær í heiminum, sum fullveldislond hava fram um ríkispartar. Tað boðar ikki frá góðum, at báðir teir stóru andstøðuflokkarnir umhugsa at taka seg burtur úr grundlógararbeiðinum og orðaskiftinum um teir veruliga grundleggjandi spurningarnar í føroyska samfelagnum. Spurningar sum hvørki, sambandsmenn ella loysingarmenn sleppa undan at taka støðu til.



# Tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum

**Føroya Javnaðarflokkur**



Fyri at taka okkum fram í føroyskum sjálvstýri er umráðandi at hetta verður eitt felags mál og mið - ikki fyri helvtina, men fyri alla tjóðina, fólkið og flokkarnar. Á grundlógarráðstevnuni í mars 2003 sóust góðir møguleikar fyri eini tjóðskaparligari semju í sjálvstýrismálinum út frá hesum støði:

- Sjálvstýri Føroya skal víðkast og styrkjast.
- Føroyar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti, og vit kunnu tí frítt velja einahvørja broyting í stjórnarligu viðurskiftum okkara, sum vit koma ásamt um og standa saman um.
- Heimastýrislógin er ikki longur nøktandi karmur um føroyskt sjálvstýri. Í staðin verður nýggja stjórnarstøða Føroya ásett í sjálvstýrissáttmála millum Føroyar og Danmark.

### Tíðin er farin frá Heimastýrislógini

Tað vóru grundleggjandi broytingar gjørdar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, tá Heimastýrislógin kom fyri 55 árum síðani. Føroyar fingu lóggávu- og fyrisitingarvald, sum saman við avgerandi stuðli frá ríkismyndugleikunum hava staðið fyri stórum framtøkum í menningini av einum føroyskum vælferðarsamfelag

Tó er tað í dag ein sannroynd, at Heimastýrislógin ikki nøktar krøvini um føroyskt sjálvstýri. Hon avmarkar heimildir og virkisføri hjá føroyskum myndugleikum, og hon elvir til ógreiðir í valds- og ábyrgdarbýtinum millum føroyskar og danskar myndugleikar.

### Sjálvsavgerðarrætturin er ómissandi

Á grundlógarráðstevnuni var ein greið niðurstøða hjá leikum og lærdum, at Føroyar eiga sjálvsavgerðarrætt uttan minsta iva. Føroyar kunnu skipa seg í samveldi ella ríkisfelagsskap við annað land ella taka loysing, og fáa altjóða viðurkenning um nýggju støðu okkara,

- um løgting og landsstýri taka avgerðina á ein kvalifiseraðan hátt og standa við avgerðina,

- um føroyska fólkið áhaldandi tekur undir við avgerðini og vísir hetta t.d. á fólkaatkvøðu.

Sjálvsavgerðarrætturin er fyrst og fremst ein spurningur um sjálvsfatan. Sjálvsavgerðar-rætturin er tí ómissandi, so longi Føroya fólk og Føroya land eru til.

### "Tvøroyrarskjalið" leingir um tíðina við heimastýri

Við tí sonevnda Tvøroyrarskjalinum frá juni 2003 samdust landsstýrið og danska stjórnin um at gera ein nýggjan yvirtøkuleist fyri einfaldgering av mannagongd og heimildum í samband við yvirtøku av málsøkjum, sum fella uttan fyri tey í Heimastýrislógini nevndu A- og B-mál. Millum manna verða tey nú nevnd C-mál. Tó eftir skulu standa uttanríkis- og verjumál, sum ikki kunnu yvirtakast. Tað er merkisvert, at henda avtala skal ikki setast í gildi sum ein politiskur sáttmáli millum tveir partar, men sum donsk ríkislóg!

Yvirtøkulógin verður tí bara ein nýggj undirgrein til ta gomlu Heimastýrislógina, uttan nakrað innihaldsliga broyting av skipanini. Tí eru bæði alternativu uppskotini hjá andstøðuflokkunum, Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum og Nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum, meira víðgangandi enn ABC-heimastýrislógin hjá landsstýrinum, tí tey bæði uppskotini flyta mørk í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark - tað ger ABC-heimastýrislógin ikki.

Tí leingir ABC-heimastýrisleisturin stríðið um ríkisfelagsskap ella fullveldi. Allar ógreiður standa framvegis óloystar og fara framvegis at klúgva tjóðina í tveir partar í hesum máli. Vit fara áhaldandi at liva undir heimastýrisskipanini í langa tíð framyvir - avgerðin í sjálvstýrismálinum verður útsett í ókenda tíð.

### Tjóðskaparliga semjan um ein sjálvsstýrissáttmála

Í staðin fyri ætlanina at halda áfram við heimastýri eiga vit at gera eina semju við hesum høvuðsinnihaldi:

- At vit áseta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í einum sjálvstýrissáttmála sum ein politiskan sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond, ið viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum felagsskapi - ríkisfelagsskapi, samveldi ella frælsum felagsskapi.

Til tess at tryggja Føroya sjálvstýri í eini nýggjari samveldisskipan er neyðugt við formligum og meira bindandi ásetingum partanna millum, enn tey lyfti danskir myndugleikar seinastu árini hava givið um at virða tær avgerðir, sum føroyingar taka.

Hetta ber til við sjálvstýrissáttmálanum, sum Føroyar gera við Danmark.

- hann kemur ístaðin fyri heimastýrislógina, sum fer úr gildi,
- hann staðfestir føroyingar sum tjóð og Føroyar sum land við sjálvsavgerðarrætti,
- hann ásetir valdsbýtið millum londini, millum føroyskar og samveldismyndugleikar,
- hann staðfestir, at Føroya løgting og landstýri verða hægsti myndugleiki og evsta vald í øllum málum, sum eru undir føroyskum málsræði,
- hann ásetir ávísa mannagongd, um so verður at Føroyar seinni vilja taka seg úr samveldinum,
- hann skal fráboðast ST, so hann fær altjóðarættarligt gildi.

Tað styrkir uppaftur meir um sjálvræði okkara, at nýggja stjórnarskipanin verður ásett í eini grundleggjandi stjórnarlóg (grundlóg):

- hon sigur hvussu politiska valdið er skipað innanlands og úteftir,
- her verður ásett hvussu landið er skipað fyrisitingarliga og rættarliga,
- her verða rættindi og skyldur hjá borgarum landsins festar í hægstu lóg.

Ein komandi føroysk stjórnarlóg skal taka støði í teim galdandi ríkisrættarligu viðurskiftunum, og hon ásetir hvør mannagongdin skal verða, um Føroya fólk vil gera mundandi broytingar í ríkisfelagsskapinum, siga hann upp ella skipa annað samstarv. Ein slík stjórnarlóg kann kann haraftrat bert fáa gildi, um Føroya fólk tekur undir við henni á kvalifiseraðan hátt, við fólkaatkvøðu, við løgtingssamtykt og einaferð aftrat av nýggjum løgtingi, eftir at val hevur verið.

Tað ber væl til, at smærri lond, sum eru í ríkisfelagsskapi ella samveldi við onnur, hava sína egnu stjórnarlóg, umframt eina samveldis- ella ríkisgrundlóg. Tað eru fleiri dømi um at tað ber væl til aðrastaðni - so ber tað eisini til hjá okkum.

Nú grundlógarnevnd fer til verka av nýggjum, er óhugsandi at gera eina grund-leggjandi stjórnarlóg, sum bert helvtin av tjóðini tekur undir við.

Javnaðarflokkurin setir tí sum treyt fyri framhaldandi arbeiðinum í nevndini, at ein komandi stjórnarlóg skal byggja á eina breiða tjóðskaparliga semju í sjálvstýrismálinum, ella í minsta lagi eina breiða semju um eina staðfesting av teirri verandi ríkisrættarligu støðuni og hvør mannagongdin skal verða, um henda skal broytast. Tað verður fyrsta uppgávan hjá grundlógarnevndini at orða hesa semju.

Av tí at tíðarfreistin er stutt - nevndin skal lata landsstýrinum fyribils álit og uppskot til grundlóg í seinasta lagi 25. apríl 2004 - setir Javnaðarflokkurin eisini sum avgjørda treyt, at tann ríkisrættarligi tátturin er orðaður í seinasta lagið 1. jan. 2004.

## Fólkið fyrst - eisini í sjálvstýrismálinum tí er neyðugt við eini tjóðskaparligari semju

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Javnaðarflokkur*

Javnaðarflokkurin kunngerð nú næstu yvirlýsingina í átakinum, har floksins politikkur verður útgreinaður og dagførdur. Arbeiðið byrjaði í vár og verður hildið áfram allan vetur, har limafeløgini í tøttum samstarvi við tingmanning og starvsnevnd viðgera ymiskar politiskar høvuðstættir í okkara samfelag.

Hvørja ferð ein táttur er endaliga viðgjørdur, verður niðurstøðan fest í eina politiska yvirlýsing, sum síðani verður almannakunngjørd. Umframt at gera politikkin meira ítøkiligan og viðkomandi fyri veljaranum, so er hetta samstundis eisini eitt politiskt útspæl, har hinir flokkarnir verða kunnaðir um, hvørjar loysnir vit halda eru tær røttu.

Fyri 3 vikum síðani kom tann fyrsta av hesum politisku yvirlýsingunum, sum bar heitið "Miðfyrisitingin skal umskipast og tænastan til borgaran betrast". Hon kann framvegis lesast á heimasíðuni www.javnadarflokkurin.fo

Hesaferð snýr yvirlýsingin seg um sjálvstýrismálið. Víst verður á, at tað er alneyðugt við eini víðfevnandi tjóðskaparligari semju í sjálvstýrismálinum. Við einum ítøkiligum uppskoti leggur Javnaðarflokkurin eisini upp til, hvussu ein slík tjóðskaparlig semja kann røkkast, og hvat innihaldið í henni kann vera. Eisini umrøður yvirlýsingin floksins støðu til arbeiði í grundlógarnevndini og tørvin á eini grundleggjandi stjórnarlóg, sum skal vera fyri alt fólkið - ikki fyri aðra helvtina av tjóðini, men fyri alla tjóðina.

Allar royndir vísa okkum - eisini hendingarnar seinastu dagarnar - at verulig framtøk í føroyskum sjálvstýri skulu grundast á eina tjóðskaparliga semju, sum vit sjálvi koma fram til her í Føroyum.

*Tórshavn 16. okt. 2003*